# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Havnar leksikon:

## Ville heiðraður av Harry S. Truman í 1946

Í 1914 flutti havnarmaðurin Hans Christopher Vilhelm Reinert Joensen (1891-1949), vanliga nevndur Ville, til USA at búgva.

Skjótt kemur hann í US Marines, og í 1943 verður hann útnevndur "Marine Superintendent" fyri alt Ísland. Hetta var undir amerikansku hersetingini av Íslandi.

Í 1946 verður hann heiðraður av amerikanska forsetanum Harry S. Truman, fyri sín leiklut í seinna heimsbardaga.

Ville andaðist í New York í 1949 og er grivin har.

Innsetta myndin er av brævinum frá amerikanska forsetanum, har stendur: *"To you who answered the call of your country and served in its Merchant Marine to bring about the total defeat of the enemy. I extend the heartfelt thanks of the Nation. You undertook a most severe task – one which called for courage and fortitude. Because you demonstrated the resourcefulness and calm judgment necessary to carry out that task, we now look you for leadership and example in further serving our country in peace".*

Ville var sonur Amaliu Joensen, f. Müller, úr Havn, sum hevði privatskúla í Kristinesminde í Rættará (dóttir H. C. Müller, sýslumann). Amalia varð vanliga nevnd frú Joensen. Pápin var Johan Carl Joensen, vanliga nevndur Grønlands-Johan.

Í 1943 var eitt amerikanskt herskip í Føroyum. Skipið lá á Reduni í Havn, og Ville varð fergaður í land, so hann kann kundi vitja mammu sína. Pápin var tá deyður.

Spurningurin er, um hann er einasti føroyingur, sum er vorðin heiðraður av amerikanskum forseta.



Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í samband hesa frá greiðing um Villa, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon, á telefon 314647 / 273168.

*Næstu ferð hava vit myndir av handlinum, Sam Olsen´s efterfølgere, sum var settur í stovn í 1897. Handilin var fyrsti ísenkramhandil í Havn og hevði fyrstu sigarettautomatina í landinum.*

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæri bróðir

**Odmar Lauritsen**
**Skipari, á Fossi, Sørvági**

andaðist og varð jarðaður 1. des. 2004.

Hjartaliga takka vit starvsfólkinum á Ellis & Avlamisheiminum í Vágum fyri tykkara hjartaliga og vinsama blíðni tit høvdu við Odmari. Takk at tit vóru so góð við hann hansara seinastu tíð her hjá okkum.
Eisini eina tøkk veita vit heimahjálparunum, sum vóru um hann heima.
Tøkk til prest fyri tey góðu orð við jarðarferðina, tøkk til kirkjutænarar, berarar og sangarar.
Tøkk til húsmøðrafelagið fyri ta vælvild, tit sýndu okkum við húsinum til ervið, og tykkum, sum hjálptu til.
Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**John**

## Tøkk

Í sambandi við at móðir okkara

**Astrid Joensen**
**(f. Berg í 1911 í Nesi í Hvalba)**

lá sjúk, doyði og varð jarðað, vilja vit hjartaliga takka starvsfólkunum á Ellisheiminum fyri hjálp og stuðul, Frelsunarherinum og Sámal Jákup Joensen fyri góðu jarðarferðina og Sigrid Sivertsen fyri vakra sangin.
Somuleiðis takka vit øllum tykkum, sum fylgdu henni til gravar og við blómum ella á annan hátt sýndu henni seinasta heiðurin.

**Børnini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra kona mín, góða mamma, omma, langomma og vermamma okkara

**Ebba Winther**
**Tórshavn**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til Sonju Klein, prest, fyri troystarrík orð, bæði í heiminum og í kirkjuni. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Føroya Felag móti krabbameini.
Tøkk til berarar, sangarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum, og øllum tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstaka tøkk vilja vit veita tykkum í heimarøktini, sum vóru um hana til tað seinasta.

*Familjunnar vegna*
**Bogi, Dorthea og Sigrid**